# Fá sum ikki hava fartelefon



Olga Fossdalsá umgird av telefonum og øðrum, sum fæst til keyps í Telebúðini í Skopun

Mynd: Jens Kr. Vang

**– Her kemur fólk inn alla tíðina, sigur Olga Fossdalsá, sum starvast í Telebúðini í Skopun.**

**Fyri henni er eingin ivi um, at rætt var at flyta Telebúðina av Sandi og til Lonina í Skopun**

SAMSKIFTI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Skopun:** – Tað eru fáir dagar, at vit ikki selja nakra fartelefon.

– Onkran dagin selja vit omanfyri seks telefonir, men tá tað nærkast jólum eksploderar sølan, sigur Olga.

Telebúðin helt áður til á Sandi, men er í dag partur av handilsdeplinum Lonini í Skopun. Her finnast somuleiðis matvøruhandilin Sparni og Salong 1700.

Her er talan um eitt stað, her nógv fólk vitja hvønn einasta dag. Og tað merkja tey eisini í Telebúðini.

Umframt stóru søluna av fartelefonum, er gongdin eisini hon at fleiri og fleiri fáa sær breiðband.

– Tað vísir seg, sum um tey flestu velja at fara tann vegin, sigur Olga.

Starvið hjá Olgu er rættiliga fjølbroytt og spennandi.

Fólk koma við fyrispurningum um ymiskt viðvíkjandi telefonum teirra, skrásetingar skulu gerast, og so ber eisini til hjá kundunum at keypa fløgur og annað.

– Tað eru fáir sandoyingar sum ikki hava fartelefon í dag, slær Olga fast.

# Eivør bergtók Ísland



**Eftir avlýstar konsertir í desember vegna ræddartrupulleikar, fór Eivør aftur á pall í Íslandi leygarkvøldið, fyri bæði áskoðarar og Eivør gjørdist hetta ein serlig upplving.**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í vikuskiftinum hevði Eivør Pálsdóttir tvær sera væleydnaðar konsertir í Reykjavík. Í Háskólabíó fóru Eivør, íslenski croonarin Raggi Bjarna, 40 tónleikarar og eitt 60 manna stórt kór á pall saman. Fyri Eivør var hetta ein heilt serlig uppliving.

– Tað er langt síðan, at eg havi havt tað so stuttligt á eini konsert, sigur Eivør við nógvari sannføring í røddini.

Fyri jól hevði Eivør fleiri sera væl vitjaðar og góðar framførslur í Reykjavík. Tíanverri gjørdist Eivør sjúk og mátti tí avlýsa seinastu konsert sína, ið skuldi haldast saman við einum íslendskum kóri. Eftir ein lítlan steðg fór Eivør undir upptøkur av komandi fløgu síni, umframt at konsertir í Skotlandi, Írlandi og USA hava verið á skránni. Konsertirnar leygarkvøldið vóru fyrstu konsertirnar í Íslandi eftir keðiligu upplivingina, og Eivør er sera glað um, at tær gingu somikið væl.

– Tað er ótrúliga deiligt, at hetta var somikið væleydnað. Hetta er ein góður máti at koma aftur, sigur Eivør.

Á konsertini leygarkvøldið sluppu áskoðararnir at uppliva eina heldur øðrvísi Eivør Pálsdóttir. Konsertin var eitt samstarv millum Eivør og Raggi Bjarna, ið er farin um tey sjeyti, og hevur verið eitt stórt navn í íslendskum tónleiki síðan fimti árini. Tey valdu tí at spæla nógv gomul íslendsk løg. Eivør og Raggi Bjarna sungu saman, umframt, at tey bæði hvør í sínum lag framførdu nøkur løg við symfoniorkestri og kóri. Raggi Bjarna framførdi croonaraløg, so sum løg hjá Frank Sinatra. Eivør framførdi 4 egin løg sett út til symfoniorkestur og kór, m.a. Hjarta mítt og Mín móður.

– Tað var stuttligt og øðrvísi at spæla saman við einum stórum orkestri og kóri, greiðir Eivør frá.